# út at koyra

## Yaris nr. 1

Toyota Yaris bleiv nummar eitt í stóru EuroNCAP samanstoyttestunum millum 20 smærri bilar.

Kelda: FDM / Motor

## 20 mill. Golf

Í september kundi Volkswagen hátí›arhalda, at ta› vóru framleiddir 20 milliónir VW Golf´ar sí›an 1974.

Kelda: Motor Magasinet

## Mazda í Guinness

Mazda MX-5 kemur í Guinness Rekord bókina, fyri at vera heimsins mest seldi lætti sportvognur vi› tveimum setrum.

Kelda: Motor Magasinet

# Vauxhall Velox og Cresta frá 1961

MAGNUS GUNNARSSON

Á myndum av gomlum Vauxhall bilum er ikki altí› so lætt at avgera, um talan er um ein Velox ella Cresta. Orsøkin er tann at ta› í fleiri førum vóru somu bilar í ymiskum útgávum. Velox var standard útgávan, me›an Cresta var luksusbilurin.

### Panoramarútar

Bilarnir, vit hava myndir av her, er 1961 modelli›, sum líkist einum amerikanara frá tí tí›ini. Eins og Opel høvdu fleiri Vauxhall bilar panorama rútar framman og aftan, t.v.s. at rútarnir er bendir um hjørnini, fyri at geva betri úts‡ni sum vit síggja á myndunum. Hetta vóru sera snøggir bilar vi› 6 syl. motori vi› 2651 cc. Og 113 HK.

Koyrieginleikarnir vóru gó›ir, tá hugsa› ver›ur um, at teir høvdu bla›fja›rar aftan og diogonal dekk. Velox og Cresta vóru stórir og rúmligir at fer›ast vi›, eins og teir vóru brúktir sum h‡ruvognar eisini her hjá okkum. Teir høvdu ein 3 trins fult synkronisera›an gearkassa og rættgear.

### 6 persóna bilur

Instrumentbor›i› hevur vatnrætt speedometur, har vísarnir skifta lit frá grønum til gult, tá fer›in fer upp um 50 km/t, og til reytt, tá fer›in fer yvir 100 km/t. Framman høvdu teir heila sofu, so 3 fólk kundu sita á forsetrinum, so talan var um 6 persóna bilar. Hóast ta› eru nógv ár sí›an, vit hava sæ› n‡ggjar Vauxhall bilar her um okkara lei›ir, ver›a teir framleiddir í Onglandi sum Opel bilar vi› Vauxhall búmerkjum.

*Velox og Cresta vóru sera snøggir bilar. Ta› at panoramarútarnir komu so langt aftur á forhur›ina, gjørdi at ta› kundi ver›a ringt hjá stórum fólkum at koma inn og úr bilinum uttan at sláa knæi› í hur›astólpan.*

*Petur Vilhelm, vanliga nevndur Petur Post í Vági, avheintar her ein n‡ggjan Vauxhall Cresta frá Vilhelm Nielsen. Bilurin hev›i nummar Fø 962.*



*Vauxhall Cresta rigga›u eisini væl vi› tveimum litum, og hvítum dekksí›um.*



*Vauxhall Cresta innan. Solei›is só›u flestu bilar út innan, eitt stórt rætt vi› floyturinginum innan í. Kontaktirnar sótu solei›is fyri at man mátti sleppa rættinum vi› a›rari hondini, fyri at røkka teimum undir koyring. Uttast til høgru sæst hvussu langt hur›astólpin kemur inn í bilin. Kontaktin til upp og ni›urblending sæst ni›ast til vinstru.*

**Vauxhall Cresta frá 1961**

| | |
|---|---|
| Motorurin | 6 syl. 2651 cc. 113 hk |
| 0-100 km/t | 15,2 sek. |
| Bensinn‡tsla | 11,4 km/l vi› 80 km/t |
| Longd | 454,5 cm |
| Vekt | 1210 kg. |



út at koyra

# Toyota Avensis klárur til anna› umfar

MAGNUS GUNNARSSON

Toyota Avensis kom á markna›in í 1998 sum avloysari fyri Carina E, i› var› ein av mest seldu firmabilum í 90-unum. Ta› víst seg skjótt, at sølan av Avensis bleiv størri enn vænta›, og bilurin bleiv ein av mest seldu bilum yvirhøvur.

### Facelift

Nú er Avensis komin í eini n‡ggjari útgávu, uttan at útsjóndin er so nógv broytt. Bilurin er meira ljó›leysur, motorarnir hava betri moment og meiri hestakreftir, eins og betri tilfar í kabinuni, og n‡ggjar litir innan. Framman eru broytingarnar t.d. forlyktir vi› multi reflektor og klárum glasi, n‡tt kølaragittar vi› Toyota logo, og aftan eru baklyktirnar eisini broyttar naka›.

### F†ra n‡ggir motorar

Felags fyri allar bensinmotorarnar er, at teir hava fingi› n‡ggjastu framkomnu tøknina vi› broytiligari ventilst‡ring (VVT-i). Motorstøddirnar eru 1.6, 1.8, og 2.0. Harafturat kemur ein n‡ggjur 2.0 litur common-rail turbodiesel motorur. Sum naka› n‡tt hevur 2.0 litur motorurin, umfram VVT-i tøknina eisini beinlei›is innsprænging (D-4), og 150 hk.

### Terra og linea Sol

Avensis fæst í teimum vanligu útgávunum, sedan, liftback og stationcar, og vi›víkjandi útger› er møguleiki at velja ímillum Terra og linea Sol, sum eisini fæst vi› automatgear. Allar Avensis útgávurnar uttan tann vi› 1.6 motori, hava heilautomatiskt klimaanlegg sum standard útger›. Varma og ventilatiónskontaktirnar eru nú elektroniskt st‡rdar.

### Betri bremsur

Avensis hevur nú eisini skivubremsur aftan, og ABS bremsur vi› EBD, sum b‡tir bremsukraftina optimalt á øllum hjólunum. Linea Sol D-4 hevur VSC (Vehicle Stability Control), sum mótvirkar at bilurin glí›ur út til sí›una, og BAS (Brake Assist System) i› gevur mest møguligt bremsutr‡st vi› eina har›a uppbremsing.

Toyota Avensis hevur 3 ára mekaniskt garanti ella 100.000 km, 3 ára lakkgaranti og 12 ára garanti móti gjøgnumtering. Avensis fæst nú úr kr.187.400,- .

*Framman eru broytingarnar t.d. forlyktir vi› multi reflektor og klárum glasi, n‡tt kølaragittar vi› Toyota logo*

*Betri tilfar í kabinuni, og n‡ggjar litir innan*

*Aftan eru baklyktirnar eisini broyttar naka›*

**Toyota Avensis 2.0 D-4 Sol**

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2.0 litur 4 syl.VVT-i 16V 150 hk. |
| 0-100 km/t | 9,3 sek. |
| Bensinn‡tsla | 12,0 km/l |
| Dekkstødd | 195/60-15 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 452,0 cm |
| Breidd | 171,0 cm |
| Hædd | 142,5 cm |
| Eginvekt | 1225 kg |
| Totalvekt | 1800 kg |
| Vi›førisrúm | 500 litrar |
| Prísur | kr. 242.400,- |
| Avensis 1.6 Terra | kr. 187.400,- |
| Søluumbo› | Reyni Service<br>Vegurin Langi<br>FO-188 Hoyvík<br>Tlf. 313040 |